# Smágentan við svávulpinnunum

Tað var so ræðuliga kalt. Tað kavaði, og nú fór eisini at kvølda. Hetta var eisini seinasta kvøld í árinum, nýggjársaftan. Í hesum kuldanum og í hesum myrkrinum gekk ein lítil genta á vegnum. Hon var hattleys og skóleys. Rætt er tað, at hon var í tuflum, tá ið hon fór frá húsum, men hvat hjálpti tað! Hetta vóru so stórar tuflur, mamma hennara hevði átt tær, so stórar vóru tær, og hon misti tær, tá ið hon skuldi skunda sær yvir um vegin, meðan tveir vognar fóru so ræðuliga skjótt framvið. Onnur tuflan var ongastaðni at finna, og hinari fór ein drongur við. Hann segði, at hann fór at hava hana til vøggu, tá ið hann sjálvur fekk børn.

Har gekk nú tann lítla gentan við teim naknu, smáu beinunum, sum vóru bæði reyð og blá av kulda. Í einum gomlum fyriklæði hevði hon eina rúgvu av svávulpinnum, og við einum bundi gekk hon í hondini. Ongin hevi keypt nakað frá henni, og ongin hevði givið henni eitt einasta oyra. Svong og køld gekk hon og sá so pínd út, neyðardýrið! Kavaflykrurnar duttu niður í hennara langa, gula hár, sum var so vakurt og krúllut í nakkanum, men tann vakurleikan hugsaði hon ikki um. Út úr øllum gluggum skein ljós og í gøtuni angaði av leskiligari gásasteik. Hetta var jú nýggjársaftan, og tað hevði hon í huga.

Yviri í krókinum millum tvey hús, annað kom eitt sindur longur fram í gøtuna enn hitt, har setti hon seg at húka. Tey beru beinini tók hon upp undir skjúrtið, men tað hjálpti lítið móti kuldanum, og heim tordi hon ikki, tí hon hevði ikki selt nakrar svávulpinnar, ikki fingið eitt einasta oyra. Pápin fór at buka hana, og kalt var eisini heima, tí tey høvdu bara tak yvir høvdinum, og tað geys, tó at tey høvdu roynt at tetta við hoyggj og kloddum. Smáu hendur hennara vóru næstan deyðar í kulda.

Á, ein lítil svávulpinnur hevði hjálpt eitt sindur. Bara hon hevði torað at tikið ein burtur úr bundinum, strokið hann móti vegginum og vermt fingrabeinini. Hon tók ein, „sjiisss", sum tað sjóðaði í honum, sum hann logaði! Tað var ein heitur, klárur logi, eins og eitt ljós, tá ið hon helt hondina fyri. Tað var eitt merkiligt ljós! Tann lítla gentan kendi, at hon sat undir einum stórum ovni, sum hevði blankar messingakúlur og messingabjølg. Eldurin logaði so vælsignað, vermdi so væl. Nei, hvat var hatta! Hon rætti eisini føturnar fram, fyri eisini at fløva teir – tá sloknaði login. Ovnurin hvarv – og hon sat eftir við einum lítlum enda av brenda svávulpinninum í hondini.

Hon bresti ein nýggjan. Hann brann, hann lýsti, og tá ið hann lýsti á veggin, gjørdist hesin gjøgnumskygdur sum eitt glar. Hon sá beint inn í stovuna, har borðreitt var við snjóhvítum dúki, við fínum postalíni, og so vælsignað reyð tann stokta gásin fylt við sviskum og súreplum, og tað, sum best var av øllum, gásin leyp av fatinum, fór ruggandi eftir gólvinum við gafli og knívi í rygginum, og beint yvir til ta fátæku gentuna kom hon, tá sloknaði svávulpinnurin, og einans tann kaldi, tjúkki veggurin var at síggja.

Hon bresti ein nýggjan. Tá sat hon undir tí vakrasta jólatræ. Tað var uppaftur størri og prýðiligari enn tað, hon hevði sæð gjøgnum glashurðina hjá handilsmanninum nú seinastu jól. Túsund ljós brunnu á teimum grønu greinunum, og litfagrar myndir sum tær, ið vóru at síggja í handilsvindeygunum, stóðu fyri eygum hennara. Henda lítla rætti báðar hendur upp – tá sloknaði svávulpinnurin. Tey nógvu ljósini fóru hægri og hægri upp, og nú sá hon, at tey vóru klárar stjørnur, og ein av teimum datt og hevði eina langa eldrípu eftir sær á luftini.

„Nú doyði onkur!" segði tann lítla, tí omma, sum var tað einasta, sum hevði lagt nakað í hana, men sum nú var deyð, hevði sagt henni: „Tá ið ein stjørna dettur, fer ein sál upp til Gud."

Hon bresti aftur ein svávulpinn móti vegginum, hann lýsti uttan um hana, og í glæmuni stóð gamla omman, so týðilig, so skínandi, so mild og vælsignað.

„Omma!" rópti gentan, „á takið meg við! Eg veit, at tygum eru burtur, tá ið pinnurin sloknar, burtur eins og heiti ovnurin, tann deiliga gásasteikin og tað stóra, vælsignaða jólatræið." Og hon skundaði sær at bresta allar pinnarnar, sum hon hevði eftir í bundinum, tí nú vildi hon hava ommuna hjá sær. Og svávulpinnarnir lýstu við sovorðnum ljóma, at tað gjørdist ljósari enn á alljósum degi. Omma hevði ongantíð verið so vøkur, so stór. Hon tók ta lítlu gentuna í armarnar og fór flúgvandi í glampa og gleði høgt, høgt uppeftir. Og har var ongin kuldi, ongin hungur, ongin angist. Tær vóru hjá Gudi.

Men í krókinum við húsið sat hesa køldu morgunstundina tann lítla gentan við reyðum kjálkum, við smíli um varrar – deyð, stird í hel seinasta kvøldið í tí gamla árinum. Nýggjársmorgun reis upp yvir einum lítlum líki, sum sat við svávulpinnunum, sum eitt bundið var brest av. Hon hevur ætlað at verma seg, søgdu tey. Ongin visti, hvat vakurt hon hevði sæð, í hvørjum glampa hon saman við gomlu ommu síni var farin inn til nýggjárs gleðina!




úr H. C. Andersen, *Ævintýr*, Bókadeild Føroya Lærarafelags 2005